# »Korrupsjon truer færøyske ledere«

**Soleiðis skrivar norska fiskivinnublaðið, Fiskaren, um politisku støðuna í Føroyum**

UMDØMI
*Vilmund Jacobsen*

Tað er ikki vist, at sumt, sum sagt ella skrivað verður í Føroyum, ikki eisini frættist út um landoddarnar.

Stríðið millum Torbjørn Jacobsen øðrumegin og Anfinn Kallsberg, løgmann og Jørgen Niclasen, landsstýrismann í fiskivinnumálum, hinumegin, er eftir øllum at døma kent í fleiri av okkara grannalondum.

Ein grein í norska fiskivinnublaðnum, Fiskaren, bar fyrr í hesum mánaðinum yvirskriftina, sum vit hava valt til henda greinastubban.

Tað er íslendski tíðindamaðurin hjá blaðnum í Íslandi, Magnus Thor Hafsteinsson, sum ber tíðindini úr Føroyum.

Í greinini sigur hann, at »...regjeringen på Færøyene vakler etter, at en lagtingsrepresentant beskyldte fiskeriminister, Jørgen Niclasen, for tyveri. Lagmann, Anfinn Kallsberg bliver beskyldt for økonomiske misligheter...«

Tíðindamaðurin skrivar, at Torbjørn Jacobsen leggur fiskimálaráðharran undir at hava tikið flakamaskinur og flutt tær yvir á egið virkið eftir at hava burturbeint øll skrásetingarnummur á maskinunum. Um løgmann, sigur Torbjørn, at hann hevur »misbrugt økonomiske midler« í starvi hjá einum fiskavirki.

Lagt verður aftrat, at hvørki av málunum er viðgjørt í rættarskipanini.

Sambært íslendska tíðindamanninum, skal Torbjørn hava sagt við íslendska útvarpið, at um stjórnararbeiði fer fyri bakka av tí, hann hevur ført fram, er orsøkin hon, at Jørgen og Annfinn ikki megna at reinsa seg.

# Jaspis og Ametyst fulla last

**Vesturvarði landaði eisini í Saltangará mánamorgunin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað er nokk vanligari á fiskavirkjunum, at fólkið bíðar eftir fiskinum enn, at fiskurin bíðar eftir arbeiðsfólkinum. Men nú tey fóru aftur til arbeiðis á Fiskavirking í Saltangará eftir summarsteðg í tríggjar vikur, bíðaðu 90.000 pund av upsa eftir, at fólkið kom aftur til arbeiðis.

Partrolararnir, Jaspis og Ametyst, landaðu ávikavist á Snodd og á Beta í endanum av seinastu viku. Av veiðini hjá skipunum, sum bæði vóru full undir lúkurnar, keypti Fiskavirking í Saltangará 90.000 pund av upsa, sum stóðu inni á gólvinum, tá ið fólkið kom aftur til arbeiðis.

Jason Johannesen, virkisleiðari, sigur, at Jaspis og Ametyst høvdu umleið 240.000 pund tilsamans.

**Vesturvarði mánamorgunin**

Mánamorgunin lá Vesturvarði í Saltangará við umleið 180.000 pund, harav meginparturin av veiðini var upsi. Eini 20.000 pund vóru av øðrum fiskasløgum.

Fiskavirking í Saltangará keypti allan upsan hjá Vesturvarða.

– Hesin fiskurin røkkur nakað langt, so ivasamt er, hvussu nógvan fisk vit keypa aftrat í hesi vikuni, sigur Jason Johannesen, virkisleiðari.



*Mánadagin landaði Vesturvarði 180.000 pund til Fiskavirking í Saltangará*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Restorff letur ølstovu upp í Havn



*Restorffs Bryggjarí ger nógv fyri at verða við í kappingini um ølmarknaðin í Føroyum*

**– Vit fara eisini at skipa eitt liðugt »barrkonsept«, har vit fara at bjóða okkum fram at skeinkja til veitslur, sigur Johan Mortensen**

SKEINKING
*Vilmund Jacobsen*

Einaferð í heyst fer Restorffs Bryggjarí at lata upp ølstovu í høvuðsstaðnum, har bryggjaríið í fyrsta lagi fer at marknaðarføra sínar vørur.

Hetta sigur Johan Mortensen við Sosialin.

Spurdur, um ølstovan verður skipað á sama hátt sum eitt nú Café Natúr, svarar hann játtandi, men leggur aftrat:

– Vit miðja eftir, at okkara ølstova skal verða á einum hægri støði enn Café Natúr.

Sum skilst, verður hetta ein rein ølstova, har tú bara fært drykkjuvørur og ikki mat.

**Restorffs gentur**

Johan sigur, at teir eisini arbeiða við at skipa eitt lið við sonevndum Restorffs gentum.

– Vit fara at bjóða okkum fram at útvega drykkjuvørur og skeinkja til veitslur, eitt nú brúdleyp og annað.

Hann sigur, at bryggjaríið fer at skipa eitt liðugt »barrkonsept« við øli, víni og øðrum drykkjuvørum, sum hann tekur til.

– Hetta er ein tænasta, vit vilja veita, og tí fara vit at søkja eftir 4-5 gentum, sum skulu taka sær av at skeinkja, sigur Johan.

Hann lovar, at nýggja tænastan hjá Restorff verður veitt til kappingarførar prísir.

**Drekka veikari**

Johan veit annars at siga, at sølan av veika ølinum hjá Restorff er nógv vaksin, og hann heldur, at ein av orsøkunum er, at bryggjaríið hevur gjørt nógv burtur úr marknaðarføringini.

– Fólk fara meira eftir tí veikara ølinum og víni. Rákið vísir, at fólk hugsa meira um at tálma promilluni, og hetta kann eisini hava nakað við tað sosiala at gera.

Johan Mortensen sigur, at Restorff roynir at stuðla uppundur hetta rákið, tí sum hann tekur til.

– Hetta er jú alkohol, vit hava við at gera.

# 30 skúlanæmingar hava arbeitt fisk í Saltangará

**– Einir 20 næmingar arbeiða her hjá okkum eftir skúlatíð alt árið, sigur Jason Johannesen, virkisleiðari á Fiskavirking í Saltangará**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Mánadagin byrjaðu tey aftur at arbeiða fisk á virkinum hjá Fiskavirking í Saltangará eftir, at fólkið hevur verið í summarfrí í tríggjar vikur.

Samstundis, sum virksemið byrjaði aftur á virkinum, byrjaði skúlagongdin eisini.

Jason Johannesen, virkisleiðari, sigur, at einir 30 skúlanæmingar hava arbeitt á virkinum í summar, og hann er væl nøgdur við tað, sum komið er burtur úr.

– Tað vil altíð vera soleiðis, at summi fólk av nátúr eru kvikari enn onnur, men sum heild, eru næmingarnir raskir. Summir hava arbeitt her hjá okkum leingi, og hesir eru líka so dugnaligir sum tey meira royndu.

Virkisleiðarin sigur, at nú skúlarnir byrja aftur, verða færri næmingar til arbeiðis á virkinum.

**20 alt árið**

– Men vit hava havt einar 20 ungdómar til arbeiðis her hjá okkum alt árið. Hetta eru næmingar, sum koma til arbeiðis eftir skúlatíð.

Hann vísir tó á, at tað er ikki altíð, øll hesi eru til arbeiðis í senn, men dagliga eru einir 8-10 skúlanæmingar til arbeiðis á Fiskavirking í Saltangará, at kalla bara gentur.

Spurdur, um hetta yvirhøvur eru næmingar, sum ganga í 10. flokki, sigur Jason Johannesen, at so er ikki.

– Tað vísir seg, at aldurin lækkar, men vit royna at ansa eftir, at tey flestu eru 15 ár og eldri. Tó hava vit havt nakrar gentur til arbeiðis, sum eru yngri enn 15 ár, sigur hann.




*– Skúlanæmingarnir eru raskir at arbeiða fisk, sigur Jason Johannesen, virkisleiðari á Fiskavirking í Saltangará*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# Fundur uttan dagsskrá

**Anfinn Kallsberg, løgmaður, fer týsdagin á fund við danska forsætisráðharranum, Anders Fogh Rasmussen, og grønlendska landsstýrisformanninum, Jonathan Motzfeldt. Eingin dagsskrá er fyri fundin, sum fyrst og fremst er ein kunning, men tó er gott høvi at stinga nakrar yvirskriftir út í kortið, sum síðan skulu avgreiðast til næsta ríkisfund, sigur løgmaður**

RÍKISFUNDUR
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Seinast løgmaður og danski forsætisráðharrin hittust, var í januar. Nú kemur Fogh aftur á ríkisfund.*

*Savnsmynd*

Anfinn Kallsberg er týskvøldið vertur fyri ríkisfundinum við Anders Fogh Rasmussen og Jonathan Motzfeldt. Fundurin verður hildin í bygninginum hjá Skipaeftirlitinum í Vágum. Síðan síðsta ríkisfund, sum varð hildin í Grønlandi síðsta summar, hevur val verið bæði í Danmark og Føroyum. Í Danmark eitur leiðarin nú Fogh Rasmussen og ikki Nyrup Rasmussen, men í Føroyum eitur hann framvegis Kallsberg. Tó er politiska grundarlagið undir samgonguni broytt, og samgongan stýrir eftir einum nýggjum samgonguskjali.

- Ríkisfundirnir eru ætlaðir sum ein kunning millum ymsu partarnar í ríkinum, bæði hvat viðvíkur búskaparligu og politisku viðurskiftunum, og tí fari eg millum annað at kunna danska forsætisráðharran um politikkin hjá nýggja landsstýrinum, eisini sjálvstýrispolitikkin, sigur Anfinn Kallsberg. Hann vísir í hesum sambandi á, at fyrr í summar kom út eitt álit um framtíðar sjálvstýrispolitikkin hjá Grønlandi, og tað kemur helst upp at venda í sama viðfangi.

**Stuttir fundir**

Bara hálvur triði tími er settur av til ríkisfundin týskvøldið, og tí verða ikki stundir til at viðgera øll mál, sigur Anfinn Kallsberg. Men tó verða nøkur høvuðspunkt at tosa um, sum embætisverkini í teimum trimum pørtunum í ríkinum síðan skulu arbeiða víðari við. Mikumorgunin hevur løgmaður tveir stuttar, uppfylgjandi fundir, ávíkavist við Fogh og Motzfeldt.

- Hóast vit ikki hava góðar stundir til at tosa øll mál ígjøgnum, so meti eg, at ríkisfundirnir hava stóran týdning, tí her hava vit møguleika at tosa saman um yvirordnaðan politikk og stinga nøkur mál út í kortið, sum vit skulu arbeiða víðari við, sigur Anfinn Kallsberg.

Meðan Anders Fogh Rasmussen fer av landinum aftur longu fyrrapartin mikudagin, so steðgar Jonathan Motzfeldt til Útnorðurfundin millum Føroyar, Grønland og Ísland, sum verður mikukvøldið. Mikudagin kemur íslendski forsætisráðharrin David Oddsson til Føroya.

Anfinn Kallsberg metir, at leisturin við at halda ein ríkisfund á hvørjum ári er sera góður. Í fjør hittust leiðararnir í teimum trimum pørtunum í ríkinum í Grønlandi, og næsta ár verður ríkisfundurin í Danmark.

## Økt samstarv

Anfinn Kallsberg hevur svarað játtandi uppá fyrispurning frá Hetlandi, Orknoyggjum og Hebridunum um at halda árligan fund.

Eftir at landsstýrið fyri nøkrum árum síðan fór at økja um samstarvið við Hetlendsku myndugleikarnar, hevur løgmaður nú fingið fyrispurning frá myndugleikunum í Hetlandi, Orknoyggjum og Hebridunum um at halda ein felags árligan fund. Og løgmaður hevur longu svarað játtandi.

- Eg haldi, at tað hevur stóran týdning at víðka um samstavið við hesar oyggjar, og tí svaraði eg beinan vegin ja til fyrispurningin, sigur løgmaður. Hann sigur, at lagt er upp til, at fundirnir skulu skipast eftir sama leisti sum Útnorðurfundurin millum Føroyar, Ísland og Grønland. Hesin fundur varð seinast hildin í Íslandi í 1999, men mikudagin verður hann aftur hildin, hesaferð í Føroyum. Ætlanin er, at Útnorðurfundurin skal haldast á hvørjum ári.

# Ein felags trupulleiki hjá allari alivinnuni

**Ákærurnar um dumping, sum alarar í ES hava reist móti Føroyum og føroyskari alivinnu er ein trupulleiki, sum vinnan má loysa í felag. Tað sigur Hans Jacobsen, formaður í Havbúnaðarfelagnum, nú boðini frá ES um, hvørjar fyritøkur skulu kannast, eru á veg úr Brússel**

ALIVINNA
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Ákærurnar hava hingið í luftini eina tíð.Føroyingar hava selt laks á ES marknaðinum fyri dumping prís. Ákærurnar, sum eru reistar av øðrum alarum innan ES, hava fingið myndugleikarnar í Brússel at taka stig til eina umfatandi kanning av føroysku alivinnuni. Í fyrsta umfari skuldu bæði alarar og sølufólk svara nøkrum innleiðandi spurningum, sum skulu vera grundarlag undir eini víðari kanning av nøkrum fyritøkum í føroysku alivinnuni.

Tær fyritøkur, sum ES velur at kanna nærri, skulu millum annað svara spurningum um rakstur og fíggjarlig viðurskifti. Spurningarnir, sum fevna um alt árið í fjør, eru umleið 80 blaðsíður til longdar.

**Føroyingar fyrireika seg**

Felagið hjá alarunum, Føroya Havbúnaðarfelag, hevur leitað sær hjálp hjá eini sakførarafyritøku í Brússel, Van Bael & Bellis, sum er serkøn í dumping málum. Eisini er settur ein trímannabólkur, sum samskipar arbeiðið at fyrireika alivinnuna til at svara ákærunum úr ES. Í bólkinum sita Jan Mortensen, Niclas Rasmussen og Regin Jacobsen.

- Vit meta, at ákærurnar um dumping er eitt felags mál hjá vinnuni, tí hugsast kann, at út frá teimum fyritøkum, sum verða kannaðar, verður øll vinnan dømd, sigur Hans Jacobsen, formaður í Havbúnaðarfelagnum. Tí hevur Havbúnaðarfelagið gjørt av at savna vinnuna um henda trupulleika, og eisini er tað vinnan í felag, sum ber kostnaðin av at fáa eina sakførarafyritøku í Brússel at hjálpa.

Tá blaðið fór til prentingar, vóru boðini úr ES um, hvørjar fyritøkur skulu kannast til botns, ikki komin. Men bæði Hans Jacobsen, formaður í Havbúnaðarfelagnum, og Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, mettu, at nøvn kunnu setast á fyritøkurnar, helst longu mánadagin.

Hans Jacobsen metir, at talan helst verður um tríggjar ella fýra fyritøkur, sum ES vil kanna nærri. Fyritøkurnar, sum verða kannaðar, hava 37 dagar at svara kanningartilfarinum.

